# Norðoya Sparikassi gjørdi skjótt av




www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



## Redaktiónsleiðari

### - Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Norðoya Sparikassi hevur longu selt Hjá Eli í Havn, Hjá Pidda á Toftum og Statoilstøðin á Argjum. Virksemið hjá Gunnleivi við Hoyvíksvegin verður væntandi selt í vikuni.

Tað tók ein viku hjá Norðoya Sparikassa at selja gamla handilsimperiið hjá Osmundi Justinussen og synunum Gunnari og Tummasi. Handilin hjá Eli við Landavegin, Statoilstøðin á Argjum og Hjá Pidda á Toftum eru seld, meðan bakaríið og handilin hjá Gunnleivi væntandi verða seld í vikuni. Sostatt eru allir fýra handlarnir í P/F Vørði, sum Norðoya Sparikassi keypti 1. august, longu seldir.

Eftir stendur bygningurin hjá Gunnleivi við Hoyvíksvegin.

– Tað er eingin loyna, at tað einans hevur verið bygningurin við Hoyvíksvegin, sum vit vóru áhugað í, tá vit keyptu P/F Vørður. Vit eru tískil fegin um, at handlarnir nú eru seldir, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

### Ymiskir keyparar

Nýggju eigararnir eru allir virknir handilsmenn. Handilin hjá Eli er seldur til Jaspur Johannesen, ið frammanundan eigur matvøruhandlarnar Inn ávikavist við Norðskála og í Klaksvík.

– Vit eru sera fegin um keypið. Handilin hjá Eli passar væl inn í okkara handilskonsept og ætlanirnar um at víðka um okkara virksemi, sigur Jaspur Johannesen.

Handilin hjá Pidda á Toftum hevur handilsmaðurin Kristian Suni Jensen – vanliga nevndur Bassi – keypt. Hann eigur eisini handilin hjá Haraldsen í Fuglafirði, Kiosk Vári í Runavík og í Klaksvík umframt gamla snikkaravirkið á Kambsdali.

Petur Eirik Djurhuus og Hans Jørgen Djurhuus hava keypt Statoilstøðina á Argjum. Feðgarnir eiga frammanundan matvøruhandlarnar PE í Havn og PW í Gøtu.

Enn er óvist, hvør keypir virksemið hjá Gunnleivi við Hoyvíksvegin.

### Við í fíggingini

Stjórin í Norðoya Sparikassa dylur ikki fyri, at áhugin fyri handlunum hevur verið stórur. Har vóru fleiri um boðið, sigur hann, men sparikassin legði alla tíðina dent á, at keyparin skuldi hava royndir á økinum.

Ein freistandi tanki er at selja til hægstbjóðandi, men sum skilst stendur Norðoya Sparikassi fyri einum parti av fíggingini, og sostatt vórðu arbeiðsroyndirnar hjá keyparanum vigaðar høgt.

Hetta sær fornuftigt út. Vit hava selt til fólk, ið vita, hvat tað snýr seg um, og sum hava ætlanir um at víðka um virksemið og gerast betur, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Nú er bert bygningurin hjá Gunnleivi eftir. Við síðuna av liggur handilsmiðstøðin Miðlon, sum Norðoya Sparikassi eigur í. Ætlanin er at samansjóða báðar bygningarnar, soleiðis at bygningurin verður ein partur av miðstøðini. Sum er, hýsir hann einum bakaríi, nakrar útleigaðar skrivstovur og Rás 2. Men tey verða ikki blakað út enn.

Sum er, kann virksemið í bygninginum halda fram. Helst ganga nøkur ár, áðrenn tað verður áhugavert at nýta hann í sambandi við Miðlon, sigur stjórin í Norðoya Sparikassa.